

sólorka
TÍN VERTUR ÚTI Í VERÐINI

Fríggjakvøldið
24. desember
Tilval – sí prísin í prísskjalinum





# Minniligur jólaaftan í avbera vøkrum og søguliga spennandi umhvørvi

Ovast uppi í brekkuni Carrera del Darro, sum onkur hevur hildið vera heimsins vakrastu gøtu, finna vit Carmen de los Chapiteles.

Útsýnið er bergtakandi. Niðanfyri hava vit miðbýin í Granada. Yvirav síggja vit elligamla býarpartin Albaycín. Og beint oman fyri okkum hava vit stór-sligna Alhambra-skansan og Generalife, summar-slottið hjá seinastu maurisku kaliffunum – vakurt skrýdd við ljóslýsing, nú tað fer at skýma.

Í Granada merkir 'carmen' eini tignarlig rustikk hús við einum stórum garði við vínstokkum og frukt-trøðum.

Júst okkara 'carmen' – Carmen de los Chapiteles – er ein aldargamal bygningur, reistur í 14. øld. Hann er á tremur við søgu.

Katólsku kongarnir góðu fremsta herførara sínum, Don Gonzalo Fernandez de Córdoba, hetta vakra staðið sum tøkk fyri katólsku hertøkuna av Granada.

Og ja - tú hevur gitt rætt. Tað er her, vit fara at halda jólaaftan í ár.

Áðrenn vit fara til borðs, kunnu vit njóta spanskan guitartónleik aftur við einum glasi í tí vakra havanum við tí stórsligna útsýninum.

Vit fáa sjálvandi nóg mikið av góðum mati og drekkivørum umframt kaffi og onkrum góðum afturvið. Og vit kunnu njóta góðan sang, tónleik og annað.

Jóladag kunnu vit njóta tær sermerktu jóla-skrúðgongurnar.

